

TOYOTA AVENSIS 2.0 SOL SEDAN — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** NL 142 **Km:** 170.000
**Árgangur:** 21.02.2003

**kr. 90.000,-**



TOYOTA COROLLA 1,6 BUSINESS — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** NH 854 **Km:** 44.000
**Árgangur:** 28.05.2004

**kr. 145.000,-**



TOYOTA RAV 4 2,0 VVT-I — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VS 482 **Km:** 30.000
**Árgangur:** 04.09.2006

**kr. 284.000,-**



TOYOTA YARIS 1,3 SOUL V/KOMF — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MD 475 **Km:** 30.000
**Árgangur:** 29.12.2005

**kr. 138.000,-**



PEUGEOT 407 2,0 — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** PM 361 **Km:** 16.000
**Árgangur:** 26.06.2006

**kr. 228.000,-**



BMW 525 2,5I AUT.

**Skrásetingarnr:** JS 145 **Km:** 158.000
**Árgangur:** 05.03.1997

**kr. 85.000,-**



PEUGEOT 206 1.4 BENSIN — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TE 795 **Km:** 28.000
**Árgangur:** 31.05.2006

**kr. 145.000,-**



HYUNDAI MATRIX 1,6

**Skrásetingarnr:** HV 129 **Km:** 82.000
**Árgangur:** 04.08.2003

**kr. 68.000,-**



TOYOTA YARIS 1.0 H/B TERRA — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TL 180 **Km:** 38.500
**Árgangur:** 09.08.2004

**kr. 112.000,-**



SUZUKI SWIFT 1.5 BENSIN — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** DS 566 **Km:** 42.000
**Árgangur:** 21.02.2006

**kr. 128.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • HoyvÌk • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


# Evangelisk fundarøð í Vágum

Frá mikukvøldinum til sunnukvøldið verður ein evangelisk fundarøð undir heitinum: "Frelsa, friður og frælsi í Kristusi" vesturi í Vágum.

Fyrst verða tveir fundir í Kedron í Sørvági – mikukvøldið og hóskvøldið. Síðani verður farið í skúlan í Miðvági, har fundir verða fríggjakvøldið og leygarkvøldið øll kvøldini kl. 20 og sunnudagin kl. 17.

Svenning av Lofti, evangelistur, verður høvuðstalari á hesum fundum og heldur fundirnar saman við Páll á Lakjuni og Sveini Petersen, sum fara at taka sær av fundar- og sangleiðslu. Fundirnir í skúlanum í Miðvági verða skipaðir sum sangløtur. Har verður nógvur góður sangur, bæði felagssangur og við fleiri góðum sangarum.

Fríggjakvøldið fer unga gentan, Durita Mohr Jacobsen við tónleikabólki úr Fuglafirði at syngja. Leygarkvøldið syngur Bárur Tindskarð úr Havn og sunnukvøldið Ebenezerkórið úr Havn. Svein Petersen úr Hvalba syngur fleiri av kvøldunum. Eisini aðrir sangarar og tónleikarar verða við. Øll trý kvøldini í skúlanum í Miðvági endar Svenning av Lofti við einum evangeliskum boðskapi.

Barnamøtir verða eisini, meðan fundarøðin er. Tey verða í skúlanum í Miðvági fríggjadagin og leygardagin kl. 17.30. Anna Maria Anthoniussen og onnur taka sær av barnamøtunum.

Eisini verður eitt skeið leygardagin í skúlanum í Miðvági. Tá fer Páll á Lakjuni at hava fýra fyrilestrar, ið hann nevnir "Fýra gudsmenn í Gamla Testamenti". Skeiðið verður frá kl. 13.30 til kl. 17.

Sagt verður, at vágafólk og onnur eru hjartaliga vælkomin til tiltøkini.

**sb.**



*Svenning av Lofti*

# Sjáldsom mynd við Ågot



*Tað er ikki gerandiskostur hjá sjómonnum at verða eygnavitni til eitt so vakurt loft sum hetta seinasta sunnukvøldið í januar mánaði.*
*Teir umborð á línuskipinum Ågot úr Klaksvík vóru til fiskiskap á Íslandsrygginum sunnukvøldið 27. januar, tá teir brádliga varnaðust, hvussu vakurt tað var rundan um teir.*
*Hetta var í skýmingini og tí átti at verið myrkt. Ístaðin upplivdu teir tað sjáldsama veðurfyribrygdið sum á norskum kallast "perlemor". Bæði luft og sjógvur lýstu í og høvdu haraftrat ein serstakan lit hesa løtuna.*
*Ein teirra var so kvikur at hann fekk "forevigað" hesa sjáldsomu løtuna, og hevur síðani sent myndina til Sosialin.*